**Handil**
*Lýsingartilfar*

Smyrjibreyðsbúðin




*Starsfólk í Smyrjibreyðsbúðini frá vinstru: Elsa Maria á Gerðisbakka, Charlotte Ellendersen og Fróða Midjord*
Mynd: Álvur Haraldsen

**Sp/f Smyrji-breyðsbúðin**

**Stjóri:**
Charlotte Ellendersen

**Adressa:**
Sp/f Smyrji-breyðsbúðin
Bøgøta 14
FO-100 Tórshavn
Tel. 321618

# Altíð tað besta av tí besta

Í SMYRJIBREYÐSBÚÐINI LEGGJA VIT SERA STÓRAN DENT Á AT HAVA NÝGGJAR OG FRÍSKAR VØRUR, UMFRAMT AT VIT FRAMLEIÐA PRODUKTINI ÚR FYRSTA FLOKS RÁVØRU, SIGUR Í STJÓRIN, CHARLOTTE ELLENDERSEN

Magnus Gunnarsson

Smyrjibreyðsbúðin í Bøgøtu skifti eigara fyrr í ár. Tað er Charlotte Ellendersen, sum eigur og rekur fyritøkuna.

Charlotte sigur, at tað krevur neyva tilrættalegging at reka eina fyritøku sum Smyrjibreyðsbúðina.

Vit møta tíðliga til arbeiðis og byrja beinanvegin at gera klárt. Tað hevur alt at siga at hava nýggjar og frískar vørur at selja. Viðskiftafólkini skulu vita, at tá tey koma til okkum, fáa tey tað besta av tí besta. Vit framleiða vørurnar sjálvi úr fyrsta floks rávøru. Alt tað sum vit nýta til smyrjibreyðini, hava vit tilgørt sjálvi sum t.d. at steikja fiskin, roastbeff og fleskasteik, baka leverpostei, marinera høsnarungabringu og dampa av. Eisini verður ein stór mongd av eggum og pasta kókað til breyðini hvønn dag. Vit baka eisini alt sjálvi sum t.d. bollar og flutes. Eisini hava vit lættar heitar rættir við salat og nýbakaðum breyði.

Umframt tað sum vit selja í handlinum, koyra vit eisini vøru út av húsinum. Tað er vorðið alt meira vanligt at fólk ringja og bíleggja sær smyrjibreyð bæði til arbeiðspláss og heim til hús. Tað er so ómakasleyst at fáa ein bakka við smyrjibreyði koyrdan til dyrnar, sigur Charlotte Ellendersen, sum so at siga er uppvaksin við framleiðslu av smyrjibreyði. Mamman, Annie Jensen í Havn, var fyrsti føroyingur sum langt afturi í tíðini fór at smyrja og selja smyrjibreyð til fólk.

Charlotte, sum sjálv er útbúgvin kondittari, sigur, at í mínum starvi sum kondittari lærdi eg at verða kreativ. Tað at duga at pynta og dekorera kemur sera væl við í arbeiðinum í Smyrjibreyðsbúðini.

Hóast handilin er opin til vanligar tíðir yrkadagar, taka vit ímóti ordrum og levera eisini størri ordrar bæði um kvøldarnar, eftir vanliga arbeiðstíð leygardag og sunnudag í sambandi við t.d. føðingardagar, barnadóp og konfirmatiónir, sigur Charlotte Ellendersen.

*maggi@sosialurin.fo*





